# Ferðin hjá Kashmir

**Kashmir hava verið treiskari enn aðrar bólkar. Meðan teirra javnaldrar góvu upp, hildu limirnir í bólkinum á, og standa nú á gáttini til altjóða gjøgnumbrotið**

SØGAN HJÁ KASHMIR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á vári 1991 hittast tríggir 17-18 ára gamlir dreingir í einum venjingarhølum á Kastanie Efterskole í Keypmannahavn. Kasper Eistrup, Asger Techau og Mads Tunebjerg sita beinanvegin væl um sátt, og gera av at seta ein tónleikabólk á stovn á eftirskúlanum.

Lítið vita donsku tannáringarnir í 1991, at teir komandi 13 árini fara at vinna seg fram í fremstu røð í donskum rokktónleiki. Fyrst í nítiárunum herjar ein sonevnd grøn tónleikabylgja í Danmark. Dizzy Miss Lizzy, Psyched up Janis, Passion Orange, Mother of Mary og Kashmir eru bólkarnir, ið slóða vegin fyri grønu bylgjuni. Í dag er tað bert Kashmir, ið hava havt neyðuga hegnið at halda á. 13 ára langa ferðin hjá Kasper, Asger og Mads rúmar væl fleiri sigrar enn tap, og nú vit skriva 2004 er bólkurin ovast á tindinum og loksins á gáttini til altjóða gjøgnumbrotið.

### Á øðrum plássi

Fyrst í nítiárunum fær grungetónleikurin veruliga fastatøkur á altjóða tónleikapallinum. Bólkar, sum Nirvana, Soundgarden, Faith No More, Red Hot Chilli Peppers, Pearl Jam og aðrir gerast heitastu nøvnini í tónleikaheiminum. Grungetónleikurin setir eisini sín dám á tónleikin hjá Kasper Eistrup, Asger Techau og Mads Tunebjerg fyrst í nítiárunum.

Hóast nógv ávirkaðir av grungebólkunum, leggja limirnir í Kashmir nógv fyri at finna sín sermerkta stíl. Kashmir spæla fyrstu árini harðan undirgrunds rokktónleik. Tónleikastílin fyrstu árini kalla limirnir í Kashmir fyri Groovecore.

Í 1993 fær bólkurin fyrsta gjøgnumbrotið. Í kappingini DM Rock endar Kashmir á øðrum plássi aftanfyri Dizzy Miss Lizzy. Seinni sama ár fær bólkurin fyrsta plátusáttmálan.

### Góð debut

Fyrsta fløgan, Traveloque, kemur út í februar í 1994. Ummælarar lata væl at, og fløgan selur væl. Í 1994 spæla Kashmir fyri fyrstu ferð á Roskilde- og Midtfyns festivalinum. Í 1996 lata teir tríggir limirnir í Kashmir aðru fløguna úr hondum.

Cruzential er meira innilig enn fyrsta fløgan. Fløgan er eisini vælumtókt, og vinnur fleiri gull plátur. Bæði í 1996 og 1997 spælir bólkurin fyri fullsettum hølum.

Við fløgunum Travelogue og Cruzential staðfesta Kashmir sína støðu sum eitt av heitastu donsku nøvnunum innan danskan undirgrundstónleik.

### Góða árið 1999

Seinast í nítiárunum leggja limirnir í Kashmir á annan bógv. Tónleikurin gerst bleytari og meira kensluborin. Løgini gerast eisini meira gjøgnumførd og lurtaraskarin gerst væl størri. Fyrstu smakkiroyndina av tónleikaskiftinum hjá bólkinum fáa fjepparanir í 1999, tá fløgan, The Good Life, kemur á gøtuna.

Ummælarar eru á gosi. Fløgan verður skírd at vera ein varði í donskum rokk tónleiki. Kashmir vinna seks grammy-heiðurslønir fyri fløguna, og Politiken, Jyllands-Posturin og BT kjósa fløguna til ársins fløgu 1999.

Við hittum sum Mom in Love, Graceland, og Lambshade røkkur bólkurin í 1999 tindinum í donskum rokktónleiki. Fløgan selur yvir 100.000 eintøk. Hon verður givin út í trettan londum í Evropa, og Kashmir fer á eina drúgva konsertferð at promovera fløguna.

Til konsertferðina kemur sviin Henrik Lindgaard upp í bólkin, og Kashmir fer frá at vera ein trio til eina kvartett.

### Nýggjasta verkið

Í 2003 kemur fjórða fløgan frá Kashmir á marknaðin. Zitilites( City Lights) strýkur beinleiðis á fyrsta plássið á donsku sølulistunum. Fløgan vinnur eisini fleiri grammy-heiðurslønir á Danish Music Awards 2004. Ljóðið á fløguni er einfalt, turt og inniligt.

Løg sum Rocket Brothers, Surfing Warm Industry og The Aftermath eru javnan at hoyra á tónleikarásini, MTV. Fløgan verður útgivin í 19 londum, og bólkurin fer aftur á eina drúgva konsertferð.

Zitilites er ikki eins kommersiel sum undanfarna fløgan, The Good Life, men við nýggjasta verkinum er altjóða gjøgnumbrotið langt um leingi við at gerast veruleiki.



*Keldur: Fra Nirvana til Rocket Brothers, Gaffa, 2004. Heimasíður: kashmir. dk, gaffa.dk, og dr.dk*



# Forvitnið fær okkum til Føroya

**–Vit vænta ómetaliga nógv av ferðini, og vit ætla at vitja øll støðini í Føroyum, sum fólk vanliga tosa um. Fyri at fáa so nógv við sum gjørligt, hava vit valt at steðga á nakrar dagar. Tað hevði verið púra ørt at farið avstað beinanvegin, nú vit einaferð vit vitja oyggjarnar, sigur Henrik Lindgaard, sum er limur í vælumtókta danska rokkbólkinum Kashmir**

KASHMIR Á G!
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Talan er jú um størsta rokkbólk í Danmark, og vit eru sjálvsagt ómetaliga fegnir um, at tað hevur eydnast at fáa bólkin á G! Festivalin í ár.

Jón Tyril, ið er høvuðsfyrireikari av G! Festivalinum tann 16. og 17. juli, hevði ilt við dylja stóru gleðina, tá hann fyri nøkrum vikum síðani kundi kunngera, at tað loksins var eydnast at fáa vælumtókta danska rokkbólkin, Kashmir, at spæla á festivalinum í ár.

Kashmir hevur fyri fleiri árum síðan staðfest sína støðu sum eitt av fremstu rokknøvnunum á danska tónleikapallinum, og bólkurin er á gáttuni til eitt altjóða gjøgnumbrot.

Henrik Lindgaard spælir tangentar og gittar í danska bólkinum, og vit hava sett honum nakrar spurningar í samband við føroyaferðina hjá rokkbólkinum.

### Gamalt ynski

*Hví leitar ein av best umtóktu rokkbólkunum í Danmark sær til Føroya at spæla?*

– Vit hava í fleiri ár ynskt at vitja Føroyar. Fyri nøkrum árum síðan spældu vit í Grønlandi, og tað var heilt ótrúligt. Okkum dámar væl at vitja støð, har tú vanliga ikki kemur, og sum tónleikari hevur tú ein gyltan møguleika at gera júst tað. Tað er einki yvir at dylja, at vit eru ómetaliga forvitnir um ferðina til Føroya. Tað verður ómetaliga spennandi at hitta føroyingar á máli, og at síggja tykkara frálíku náttúru. Vit gleða okkum sjálvsagt eisini nógv til at spæla.

*Hvat fær ein bólkur sum Kashmir burtur úr at spæla á G! Festivalinum sammett við eitt nú Roskilde Festivalin?*

– Tað er eitt sindur ilt at siga. Sjálvsagt vænta vit ikki, at G! Festivalurin verður á sama støði sum Roskilde, men vit fáa óivað nógv onnur upplivilsi í Føroyum enn á Roskilde Festivalinum. Frá einum tónleikasjónarmiði er tað nógv hugaligari at spæla á smærri støðum, tí tá fært tú beinleiðis samband við áhoyraran og stemningurin er eisini heilt øðrvísi. At spæla fyri 50.000 fólkum á Roskilde var eisini ein serstøk kensla, men samanumtikið dámar okkum best tey smærru støðini.

### Vandamiklan flogvøll

*Hvat kenna tit til føroyingar og føroyska samfelagið ?*

– Persónliga kenni eg ikki tað stóra til føroyska samfelagið. Eg havi nógv vinfólk, sum hava verið í Føroyum, og øll tosa um, hvussu vakurt tað er har. Ein av mínum bestu vinum er í løtuni í Føroyum í samband við Jazzfestivalin. Eg kenni væl Leiv Thomsen, sum býr í Keypmannahavn og í desember mánaði spældu vit nakrar ferðir saman við Teiti, og hann tóktist verða ótrúliga fryntligur.

Eg veit sjálvsagt, at tit eru eitt oyggjasamfelag, og Tórshavn havi eg eisini hoyrt um. Eg havi eisini hoyrt, at tit hava ein flogvøll sum ikki er heilt vandaleysur, og at í Føroyum eru fleiri vakrar hellur.

*Hvat vænta tit av uppihaldinum í Føroyum?*

– Vit vænta ómetaliga nógv av ferðini. Vit ætla at vitja øll støðini í Føroyum, sum fólk vanliga tosa um. Fyri at fáa so nógv við sum gjørligt, hava vit valt at steðga á nakrar dagar. Vit koma á middegi hósdag og fara av landinum aftur sunnudagin. Tað hevði verið púra ørt at farið avstað beinanvegin, nú vit einaferð vit vitja oyggjarnar.

### Zitilites og Good Life

*Hevur bólkurin nakra hóming av, hvussu nógvir Kashmir-fjepparar eru í Føroyum?*

– Nei tað áni eg ikki. Eg vóni sjálvsagt, at har eru nakrir, men tað verður spennandi at síggja. Vit halda sjálvir, at vit eru eitt gott live-band, so eg ivist ikki í, at konsertin fer at eydnast væl. Eg vóni, at nógv fólk koma at lurta, so vit kunnu fáa "en ordentlig fest"

Hetta verður fyrstu ferð, at vit skulu spæla á eini strond, og tað í sær sjálvum verður ein stór uppliving.

*Hvørji løg skal føroyska áhoyrarafjøldin vænta at hoyra og síggja?*

– Vit fara fyrst og fremst at halda okkum til tvær teir seinastu fløgurnar(Zitilites og The Good Life, blðm) hjá okkum. Eitt lag verður av næst elstu fløguni, og eitt cover lag fara vit eisini at spæla. Tað verður Cinemon Girl hjá Neil Young. Hesa skrá hava vit spælt seinastu mánaðirnar.

Vit hava ongantíð verið tað slagið av bólki, sum DAD, ið ger nógv burturúr einum sceneshowi. Vit hava altíð fyrst og fremst hildið okkum til tónleikin, og ikki til dans og fýrverkarí. Vanliga royna vit at gera nógv burturúr ljósinum fyri at skapa ein góðan stemning, og tað ætli vit eisini at gera á G! Festivalinum, sigur Henrik Lindgaard at enda.

# KASHMIR @G!

## Frá Nirvana til Kashmir

Tað er ikki bert í Seattle í 1991, at ein tónleikabólkur við navninum Nirvana ger sum seg. Bólkurin, sum Kasper Eistrup, Mads Tunebjerg og Asger Techau seta á stovn á Kastanie Efterskole sama ár ber sama heitið.

Amerikonsku Nirvana hava ikki veruliga sligið sítt navn fast í Danmark, men tað gongur kortini ikki rúm tíð, áðrenn teir tríggir donsku tannáringarnir ásanna, at tað verður torført at taka kappingina upp við Kurt Cobain og hinar í Nirvana, sum seinni í 1991 fáa altjóða gjøgnumbrotið við fløguni Nevermind.

Kasper, Mads og Asger kenna seg tí noyddar at broyta navnið á bólkinum, og valið fellur á navnið Kashmir. Tónleikaliga fingu teir tríggir nógvan íblástur frá amerikanska rokkbólkinum, Led Zeppelin, og amerikanski bólkurin er eisini keldan til nýggja navnið hjá bólkinum.

Led Zeppelin hevði í sjeytiárunum eitt stórt hitt við lagnum Kashmir, sum seint í 1991 gerst heitið á bólkinum hjá Kasper Eistrup, Mads Tunebjerg og Asger Techau á Kastanie Efterskole

## Útlandið bíðar framvegis

Í kjalarvørrinum av vælumtóktu fløguni, The Good Life, sum kemur út í 1999, eru flestu danskir tónleikaserfrøðingar á einum máli um, at altjóða gjøgnumbrotið fer endaliga at gerast veruleiki hjá Kashmir.

Fløgan vinnur allar heiðurslønir, sum vinnast kunnu í Danmark, men kortini er útlendski áhugin fyri bólkinum so sum so. Hóast drúgva konsertferð í øllum Evropa, eydnaðist ikki veruliga at kveika útlendska áhugan fyri bólkinum.

Limirnir í bólkinum eru í dag rættiliga vónbrotnir av, at meira ikki spurdist burturúr The Good Life-konsertferðini. Sangarin, Kasper Eistrup, hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at fyriskipararnir hjá bólkinum gjørdu ikki sítt arbeiði til lítar, tí eftir hansara tykki vóru møguleikarnir fyri gjøgnumbroti avgjørt til staðar.

Við nýggja fløguni, Zitilites, gera Kashmir enn eina roynd at kveikja útlendska áhugan fyri bólkinum, og fleiri vænta, at fløgan kann gerast endaliga altjóða gjøgnumbrotið.

## Filmurin Rocket Brothers

12.desember 2003 varð fyrsti dokumentar filmur um Kashmir sýndur í biografinum. Í filminum fylgir filmsleiksstjórin, Kasper Torsting, bólkinum á The Good Life -konsertferðini í Evropa og fyrireikingunum til nýggjastu fløguna, Zitilites.

Upptøkurnar fevna um eini 60-80 konsertir, har í millum konsertir í bæði Grønlandi og USA. Kasper Torsting hevði tilfar á góðar 250 tímar, sum hann kókaði niður í 96 minuttir.

Í filminum verður farið tætt at teimum fýra limunum í Kashmir, og filmurin lýsir torføru løturnar hjá bólkinum, tá einki vil ganga eftir vild, og gleðisrómin, tá bólkurin loksins er klárur við at senda fløguna Zitilites út á gøtuna.

## Tim Christensen og Kashmir

– Tá eg var á veg heim úr kappingini, mældi lagið Silverflame fyri mær, og tað argaði meg nógv.

Annað plássið í kappingini DM Rock í 1993 fellur ikki í góða jørð hjá sangaranum í Kashmir, Kasper Eistrup. Hóast Dizzy Miss Lizzy enda omanfyri í kappingini, fer tíðin kortini vísa, at Kashmir fara at gerast teir drúgvaru. Við Tim Christensen á odda eru Dizzy Miss Lizzy argastu kappingarneytarnir hjá Kashmir miðskeiðis í nítiárunum.

Tá Dizzy Miss Lizzy gera av at leggja frá sær, byrja Tim Christensen og Kashmir at samstarva. Á fløguni, The Good Life, spælir Tim Christensen keyboard á fleiri av løgunum, og á soloútgávum hjá Tim Christensen hava limir í Kashmir eisini veitt honum eina hjálpandi hond.

Tim Christensen hevur seinastu árini sligið sítt navn fast sum evnaríkur solistur, og tað er eisini nærum gerandiskostur, at Kashmir og Tim Christensen býta grammy-heiðurslønir í millum sín á árligu Danish Music Awards.